# Stundin er komin til hugburðbroyting í fiskivinnuni

JOHN S. MYLLHAMAR



Nú oljudroparnir eru dýrari enn nakrantíð, og krøvini um útlát gerast strandari fyri hvørt ár, er høvi, at føroyingar broyta hugburð frá at vera ein fiskiveiðitjóð, ið altíð hevur lagt seg eftir kvantiteti (nøgd), fer at leggja seg eftir kvaliteti (dygd).

Havi sjálvur verið sjómaður nógv ár. Tann ránsveiða, ið fór fram við trolarunum, var so óhugnalig, at orð eru ikki fyri tí. Uppi í Barentshavinum, tá ið nógv var at fáa, sást tú sjáldan dekkið. Tað varð bara fylt oman á, tá ið trolið hevði verið úti eina ávísa tíð. Ovasta lagið av fiskinum frysti og var ov hart at flekja, tí vóru øll hesti tonsini tveitt útaftur. Teir niðastu fiskarnir vóru kleimdir, og tí vóru eisini tey mongu tonsini traðkaðir út gjøgnum lensiportrið. Hýsa, kalvi og onnur dýr fiskasløg fóru sama veg. Fyri ikki at tala um høvd, ryggir og innvølirnir á fiskinum. Bara stóri toskurin var tikin mitt burtur úr tí øgiligu fiskarúgvuni á dekkinum, sum alla tíðina lá javn við lúnningini.

Uttan at vera fiskifrøðingur, undrist eg yvir, at serkunnleikin rópar so hart um, at skal fiskastovninum verða lív lagað, er neyðugt fullkomulig at friða inni við land. Ja, men har er einki at friða, tí fiskur livir ikki á plinkum og miðum. Kønir útróðrarmenn, sum kenna fiskileiðirnar framvið landi eins væl og teirra egna buksulumma, koma, eftir at hava roynt heilar dagar, aftur á landið við einum brondingi og tveimum seiðum. Soleiðis hevur tað ongantíð verið áður. Um lítið var til okkkurt ár, so fekk tú altíð til eini knettir. Her er tí einki at friða.

Fiskurin kemur mær vitandi uttan av havinum og inn á grunnin. Hann kemur ikki saman við seyðinum oman úr fjøllunum. Er alt havið avhegnað við effektivasta trolreiðskapi, so sigur tað seg sjálvt, at fiskurin sleppur ikki inn at landi.

Meira enn fjøruti ár eru liðin síðani eg fyrstu ferð av á Vertíð í Íslandi. Longu tá, fyrrapartin í seksti árunum, kom størsti parturin av íslendska flotanum inn hvørt kvøld við veiðini. Og veiðan var fiskur, ið bara var bløðgaður. Kruvt var í landi, har úrdrotturin í fiskinum, bæði rogn og livur, vóru gagnnýtt. So langt frammi vóru íslendingar longu tá.

Í dag bjóðar marknaðurin sær eisini at keypa magan og annað úr fiskinum. Mær vitandi er slíkt aldri komi uppá tal í Føroyum, at leggja seg eftir, at fáa sum best burtur úr smærri nøgdum.

Ikki bara vildi hetta givið nógv arbeiði á landi, men eisini givið manningini umborð, eitt munandi betrið lív, at sloppið undan í illveðri at standa heili samdøgur og reinsa hvønn tertling.

Trol er eitt ránsveiðiamboð. Tað ikki bara oyðir, men oyðileggur havbotnin og styggir fiskin. Trol og húkur kunnu ikki saman. Tað er ein sannroynd.

Eingir grunnar verða oyddir av húkaveiði. Fiskurin kann ikki siga nei takk við eitt trol, men tað kann hann gera við ein húk - og hann ger tað eisini - ofta. Loddið kann rulla í fiski, men hann býtur ikki á fyrr enn hansara tíð er.

Á føroysku fiskigunnunum, bæði á djúpum og grunnum vatni, eigur bara húkaveiði vera loyvd. Har afturat átti fiskurin verið landaður hvønn dag. Tað vildi gjørt góðskuna so góða, at vit høvdu ongan inntøkumiss havt, tvørturímóti, við tíðini høvdu vit fingið munandi meira fyri nógv smærri nøgdir.

# Fíggjarstýringin út av lagi vánalig

MAGNI LAKSÁFOSS
Sambandsmaður



**Ein staðfesting ein og hvør við fíggjarligum skili má gera sær av sitandi samgongu er, at stýringin av búskapinum er farin fyri bakka, og at ringt verður at rætta upp aftur á skeivu kósina – hóast samgongan einans hevur sitið fáar mánaðir. Avlopið er vent til hall, og kósin frameftir gevur einans ábendingar um verri fíggjarligt óskil**

**Avlop vent til hall**
Avlopið á fíggjarlógini fyri 2008 er nú burtur og roknað verður við, at avlopið er vent til hall. Hetta skal síggjast í mun til, at undanfarna samgonga legði eina fíggjarlóg fyri tingið við 170 mió. í avlopi fyri fíggjarárið 2008, og at tá nýggi fíggjarmálaráðharrin kom til staðfesti hann, at hann ynskti 300 mió í avlopi í 2008 – seinni broyttist tað til “ein trýsiffrað milliónapphædd” – og nú er avlopið vorðið hall. Legg til merkis at talan er um sama fíggjarár!!!

Orsøkirnar til gongdina eru fleiri:

Broytta samfelagsgongdin, sum gevur landskassanum minni inntøkur í m.a. MVG og skrásetingargjøldum, men har skattainntøkurnar framvegis vaksa.

Øktu útreiðslurnar til nýggja uttanríkismálaráðið, ið tók meginpartin av raðfestingini á fíggjarlógini 2008.

Vánaliga fíggjarstýringin, har útreiðslur í milliónavís ikki eru tiknar við á fíggjarlógina – t.d. 32 mió. til sjúkrahúsini, 9 mió. til Strandferðsluna, 10 mió. til undirmettar pensiónsútreiðslur o.s.fr.

Óansæð hvørja politiska áskoðan vit annars hava – høgra/vinstra ella loysing/samband, eru vit øll áhugaði í at landið verður stýrt fíggjarliga ábyrgdarfult. Tí má ein innilig áheitan á sitandi samgongu vera, at fáa fíggjarligt skil inn aftur í føroyskan politikk.

**Eiga at hava munagott avlop**
Ynskiligt hevði verið um fíggjarlógin kundi víst eitt munagott avlop, hetta átti ikki at verið so trupult - búskapurin er jú í góðum standi við metlágum arbeiðsloysi og góðum virksemi.

Tí er tað als ikki nøktandi at hall er á fíggjarlógini og harumframt at boðað er frá, at samráðingar skulu byrja um at minka blokkstuðulin við 117 mió. Óansæð politiskan lit mugu vit síggja veruleikan í eyguni og sanna at hetta er ein fíggjarliga ábyrgdarleys kós. Kósin ber brá av, at fokus als ikki er á at gera tað besta fyri land og fólk – her er einans talan um misskilta nationalismu.

**Javnaðarflokkurin slept vælferðini uppá fjall**
Tað skal vera mín vón, at Javnaðarflokkurin sær hvar kósin ber okkum og velur at hálsa um. Tað er harmiligt at standa á síðulinjuni og síggja ein flokk selja so nógv út av sínum idealum og grundsjónarmiðjum.

Tað átti at verið gjørligt hjá Javnaðarflokkinum at kasta misskiltu nationalismuna av sær og í staðin hildið seg til veruligan realpolitikk, har vit í felag arbeiða fyri at skapa eitt betri samfelag fyri øll. Verandi kós leiðir okkum einans til ótryggleika, minni vælferð og størri skattabyrður.

**Mugu rætta kósina inn aftur**
Tað er av alstórum týdningi, at politiska skipanin sum skjótast fær rætta kósina inn aftur á beint og fær fíggjarligt skil inn aftur í politikkin. Eingin av okkum kann liva við eini politiskari skipan á skeivari kós, uttan trúðvirði, og uttan fíggjarligt skil.

# Stuðul til stakar uppihaldarir – loksins!

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Í vár samtykti løgtingið, at stakir uppihaldarir kundu fáa 500 kr fyri hvørt barnið undir 18 ár skattarfrítt mánaðarliga. Tá eg tosi við mammur og pápar, sum eru stakir uppihaldarir er greitt, at fólk í fleiri førum ikki kenna til hendan møguleikan. Vit - politikarirnir - hava ikki “brandað” tað nóg væl.

Tí hesa kunning:

Hvussu søki eg?

Fær antin inn á heimasíðuna www.almannastovan.fo og prenta tær umsóknarblaðið út ella fær inn á sjálva Almannastovuna og fá tær eitt sumsóknarblað.

Freistin at søkja er 1. september.

Tú fært peningin útgoldnan 3. hvønn mánaða.

Fleiri hugsa kanska, at upphæddin ikki er ovurhonds stór og nakað er um tað – vildi fegin, at hon var størri. Hinvegin fegnist eg stórliga um, at tað eydnaðist at fáa uppskotið samtykt.

Tí vit hava framvegis politikarar, hvørs hugburður er: “Nú mugu vit eisini ansa eftir, at stakir uppihaldarar ikki fáa tað so gott, at allar familjur fara í uppløysn. Tí skulu vit vera varin við sovorðnum!” Eg lati orðini tala fyri seg! Og fegnist um at alsamt færri við hesum hugburði eru millum tey fólkavaldu.

Men lat okkum vóna og virka fyri, at hetta bert er byrjanin, tí eingin ivi er um, at júst familjurnar við støkum uppihaldarum eru millum teirra, sum í mongum førum hava truplast við at fáa endarnar at røkka saman. Ikki minst vegna vánaligu bústaðarmøguleikarnar.

Sum nevnt var hetta bert ein lítil áminning og kunning!

# Eldraráðið skal mannast fyri aðru ferð

Vilt tú vera við til at tryggja, at tey eldru verða hoyrd, og ert tú yvir 60 ár, so hevur tú nú møguleikan at gerast limur í Eldraráðnum í Tórshavnar kommunu.

Eldraráðið hevur skjótt virkað í trý ár, og 1. januar 2009 byrjar eitt nýtt skeið hjá ráðnum. Hesa ferð er valskeiðið fýra ár, og í oktober skulu fimm limir og fimm varalimir veljast í ráðið.

Seinasta freist at boða frá uppstilling til Eldraráðið er 9. september kl. 16 í Snarskivuni hjá Tórshavnar kommunu.

Uppgávan hjá Eldraráðnum er at gera vart við viðurskiftini hjá eldru borgarunum í kommununi og veita býráðspolitikarunum góð ráð, áðrenn teir taka avgerðir á eldrapolitiska økinum. Eldraráðið skal tryggja, at vitanin og royndirnar, ið eldru borgararnir sita inni við, verða virðismett og gagnnýtt á besta hátt.

### 60 ára aldursmark

Øll tey, sum eru 60 ár og eldri og hava bústað í Tórshavnar kommunu, hava valrætt á eldraráðsvalinum, og somuleiðis kunnu øll tey, ið eru 60 ár og eldri stilla upp á valinum.

Tey, ið vilja stilla upp, skulu útfylla eina uppstillingarfráboðan, sum fæst i Snarskivuni og tryggja sær undirskriftina frá fimm stillarum, ið eisini hava valrætt til Eldraráðið.

Hevur tú góð hugskot og uppskot um, hvussu bøtast kann um viðurskiftini hjá eldru borgarunum, og vilt tú gjarna vera bindilið millum yngru politikararnar og eldru borgararnar, so er at halda seg til.

Sjálvt valið fer fram við brævatkvøðu. Allir borgarar í kommununi, sum eru 60 ár ella eldri valdagin tann 7. oktober fáa atkvøðuseðil sendandi við postinum.

Atkvøðurnar verða taldar upp í Snarskivuni seinnapartin 7. oktober 2008.